








# Hetta er mín *jólasangur*

## Jákup Símum Simonsen: *Nú ringja kirkjuklokkur so hátt*



**HUGNI**

*- Tað var ein serligur hugni at halda jól í Funningi, sigur Jákup Símun Simonsen í Hoyvík*

– Jólahøgtíðin er gleðishátíðin mikla. Her eru jólasálmarnir saman við gleðiboðskapinum tað, sum nertir við okkum. Tað ger nakað gott og tað er fjálgt, sigur Jákup Símun Simonsen í Hoyvík.

Mær dámar næstan allar jólasálmar. Serliga eru tað tey góðu sálmaløgini, ið festa seg í minnið. Men serliga dámar mær hesar burturúr: "Nú ringja kirkjuklokkur so hátt", sum Símun av Skarði yrkti; "Tað sótu seyðamenn á vakt" sum Mikkjal á Ryggi yrkti, og við lagi hjá Hans Jacob Højgaard; og "Jól hava einglaljóð", sum Jógvan Nolsøe yrkti.

Eisini havi eg tvær fløgur, sum mær dámar serliga væl at lurta eftir í jólamánaðinum. Tær eru Toftakórið og hin er við Ernst Sondum Dalsgarð, sum syngur advents- og jólasálmar. Nógv av tí nýggja dámar mær eisini væl at lurta eftir.

Sum smádrongur og hálvvaksin helt eg nøkur jól norðuri í Funningi hjá ommu og abba mínum. Tað var ein serligur hugni; og farið varð til allar kirkjugongdirnar um høgtíðina. Eitt ørindið, sum eg helt hóskaði væl til har norðuri ímillum høgu og bróttu fjøllini, var 3. ørindið í sálminum "Nú ringja kirkjuklokkur so hátt" hjá Símuni av Skarði:

*"Tó myrkur fyllir dalar og skørð<br>og stormurin ýlir í gjáum,<br>so fjakkar Jesus enn á jørð<br>við sínum jólagávum"*

Gleðilig jól.

## *Nú ringja kirkjuklokkur so hátt*

*Nú ringja kirkjuklokkur so hátt<br>við himmalskum gleðiljóði:<br>Tað stundar móti jólanátt,<br>tá Jesus varð føddur hin góði.*

*2. Nú boðast friður víða um lond,<br>nú verður hin sjúki grøddur,<br>nú losna hørðu syndabond,<br>tí Jesus í nátt varð føddur.*

*3. Tó myrkur fyllir dalar og skørð,<br>og stormurin ýlir í gjáum,<br>so fjakkar Jesus enn á jørð<br>við sínum jólagávum.*

*4. Ei brim við strond, ei ísur í skor<br>kann Jesusi forða vegin;<br>hann stígur inn for fátæks mans borð,<br>har lítil er jólagleðin.*

*5. Ja, Jesus fer í smáttuna inn,<br>blíð orð hann við gomul talar,<br>hann klappar bleiku barnakinn,<br>av himni tá gleðin dalar.*

*6. Um sorgin veg til hjarta títt fann,<br>vár Jesus teg aldri gloymir,<br>og jólaboðið grøða kann<br>ta sótt, tú í barmi goymir.*

*7. Vit ung og gomul halda nú jól,<br>vár Jesus vil øllum hýsa,<br>hann er hin bjarta lívsins sól,<br>um allar ævir skal lýsa.*

*8. Í Betlehem tann sólin upp rann,<br>um heimin hon út mundi leita,<br>at Føroya smáttum veg hon fann,<br>tí tøkk vit tær, Jesus, veita.*

*9. Øll ung og gomul, samlist nú brátt<br>og lýðið á gleðiljóðið:<br>Tað var um halgu jólanátt,<br>at Jesus varð føddur hin góði.*

*Símun av Skarði*